

Dopinggøla í svimjing

Í svimjing er enn ein dopinggøla, tá Tea-Hwan Park úr Suðurkorea verður tikin fyri doping. Hann er enn ein av kappingarneytunum hjá Páli Joensen, sum eru undir illgruna fyri at hava snýtt. Árið frammanundan verður maðurin við heimsmetinum á 1500 metrum, Sun Yang, somuleiðis tikin fyri doping.



– Set heldur ein roykvarnara ov nógv upp, enn ein ov lítið, sigur Rasmus Olsen

arbeiði og samstarvið, hann hevur møtt frá øllum hann hevur verið í samband við.

Læknarnir siga, at Rasmus var heldigur og slapp væl frá hendingini.

– Tað eru ikki øll av teimum, sum ganga við eini hondgranat innan fyri jakkan.

Kaj Leo Holm Johannesen
løgmaður, í kjaki um flóttarfólk

Ítróttur



Trætur seta sín dám á ársins fyrsta mánað

Eitt harðskapsmál í einum venjingardysti millum fótbóltsliðini HB og Víkingur endar sum politimál. Í hondbóltskappingini er ilt millum VB og Kyndil, sum ikki kunnu einast um dystaráseting

Ein venjingardystur á ovara vølli í Gundadali verður avblástur, tá víkingaspælarin, Hans Jørgen Djurhuus, brýtur nøsina á HB spælarunum, Poul Ingason. Málið fær drúgva umrøðu í miðlunum. Í Sosialinum biður Hans Jørgen um umbering, sum Poul Ingason góðtekur. Málið fær tó fylgir.



Ilt millum VB og Kyndil

Áfast blívur millum VB og Kyndil, tá tey ikki kunnu semjast um nær seinna hálvfinalan í steypakappingini í Vági skal spælast. Kyndil roynir seg við umberingum, sum at mammur ikki fáa barnagentu, og at tær missa heilar arbeiðisdagar. VB svarar aftur, at soleiðis er tað hvørja ferð hjá teimum. Orrustan endar við, at dysturin verður spældur 30. Januar. Kyndil vinnur dystin, sum helst er tann mest umtalaði hondbóltsdysturin í 2015.

U-20 landsliðið ger um seg

Føroyar U-20 landsliðið í hondbólti gevur Grikkalandi enn ein føroyskan skelk, bara tveir mánaðir eftir, at føroyska fótbóltslandsliðið vinnur Pireus. Í HM undankappingini megnar føroyska liðið at spæla 21-21 móti vertstjónini, Grikkaland. Tað kemur púra óvart á, og føroyska liðið fær nógv rós fyri avrikið.

Dagin eftir er mótstøðan uppaftur sterkari – Serbia. Hóast tað, so megnar føroyska liðið at spæla fult upp móti serbiska liðnum til tjúgu minuttir eru eftir. Tá gongur orkan undan, og Serbia vinnur 34-21.

Heðin Askham gevst

Heðin Askham gevst sum venjari hjá U21 landsliðsliðnum hjá monnum í fótbólti. Hann hevur verið við frá fyrsta bríksli saman við Bill M. Jacobsen. Eli Hentze verður nýggjur hjálparvenajri, meðan Bill M. Jacobsen verður einsamallur høvðusvenjari.



Ronaldo heimsins besti

Cristiano Ronaldo verður á triðja sinni valdur til heimsins besta fótbóltsspælara. Hann vinnur FIFA Ballon d'Or frammanfyri Lionel Messi og Manuel Neuer. Lars Olsen, landsliðsvenjari, og liðskiparin á landsliðnum, Fróði Benjaminsen, velja báðir portugisiska bóltsnillingin sum nummar eitt.